## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Upp í skrið av suðri, út á dagin minkandi til andøvsgul ella strúk í vindi. Skýggjað og támut, men eisini nakað av regni. Hitin millum 10 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri. Skýggjað og támut, tó fyri tað mesta turt. Hitin millum 9 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og landsynningi, eitt skifti minkandi til andøvsgul upp í ein strúk. Tað verður meira skýggjað og møguliga regn. Hitin millum 7 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi. Skýggjað og nakað av regni av og á. Hitin millum 7 og 12 stig.

# Jógvan Arge við nýggjari bók

**Seinasta bókin í røðini »Teir tóku land« eftir Jógvan Arge um føroyska virksemið í Grønlandi er komin. Hon lýsir tey seinastu árini av hesum virksemi, sum fekk ein bráðan enda**

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Føroyingar høvdu fiskað millum 50 og 60 prosent av síni veiðumongd í Grønlandi, men síðst í 60unum fór at ganga aftur á hondina. Tað gjørdist kaldari, og longu í 1969 var so lítil fiskur, at umsetningurin hjá Nordafar í Føroyingahavnini minkaði niður í helvt.

Hetta árið varð mett sum ein katastrofa fyri føroyingar í Grønlandi. Har var so nógvur ísur, at útróðrarmenninir lógu uppi á landi í tveir samfullar mánaðir. Línuskipini fingu lítið av fiski, og trolarnir rýmdu eystureftir.

Í 1970 fóru útróðrarmenn einans til Føroyingahavnina og ikki til hinar havnirnar. Fiskiskapurin var framvegis vánaligur, men Føroyingahavnin varð hildin opin, so hon kundi tæna føroyska flotanum, ið nú mest vóru garnaskip og laksaskip og seinni rækjuskip.

Føroyingar vildu ikki sleppa hesum seinasta skansanum í Grønlandi og tóku allan kostnaðin av Nordafar upp á seg. Stundum var virksemi í Føroyingahavnini, men í 1985 lat støðin ikki uppaftur, og í 1989 fór Nordafar á húsagang. Eitt týdningarmikið tíðarskeið í føroyskari vinnulívssøgu var at enda komið.

Í bókini verður eisini greitt frá portugalstrolarunum, sum landsstýrið skipaði fyri at byggja til langfarafiskiskap í fimtiárunum. Somuleiðis verður greitt frá føroysku nýroyndunum eftir laksi og rækjum undir Grønlandi í seksti- og sjeytiárunum.

Um alt hetta og meir aftrat kann lesast í Teir tóku land 8, sum er 222 síður og prýdd við mongum myndum. Kostnaðurin er 299 krónur í handlunum. Fullfíggjað yvirlit er yvir øll fólk, støð, skip og bátar, sum nevnd eru í teimum átta bókunum.




### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷13 |
| Nuuk | ÷6 |
| Qaqortoq | – |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | 1 |
| Halifax | 6 |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 13 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | – |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 8 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 17 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 12 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | – |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 25 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst eystan fyri Íslandi fer í ein landnyrðing norðan. Eitt nýtt lágtrýst nærkast sunnaneftir og fer fram við vestanfyri Ísland fríggjadagin.



Eitt hátrýst yvir Skandinaviu liggur næstan í stað. Lýggj luft sunnaneftir rekur inn yvir Føroyar. Fyrst í næstu viku fer eitt lágtrýst framvið vestan fyri og tað verður kaldari.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/11 kl. 06⁰⁰– 06/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 24,0 mm – mált frá 05/11 kl. 06⁰⁰–06/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 45,4 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

1. november: Fyrra kvarter
9. november: Fullmáni
10. november: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. nov | 05.12 | 17.31 | 04.12 | 16.31 | 04.27 | 16.46 | 07.12 | 19.31 | 08.12 | 20.31 | 03.27 | 15.46 | 02.27 | 14.46 | 05.27 | 17.46 | 06.27 | 18.46 | 04.57 | 17.16 | 06.12 | 18.31 |
| 8. nov | 05.51 | 18.11 | 04.51 | 17.11 | 05.06 | 17.26 | 07.51 | 20.11 | 08.51 | 21.11 | 04.06 | 16.26 | 03.06 | 15.26 | 06.06 | 18.26 | 07.06 | 19.26 | 05.36 | 17.56 | 06.51 | 19.11 |
| 9. nov | 06.31 | 18.53 | 05.31 | 17.53 | 05.46 | 18.08 | 08.31 | 20.53 | 09.31 | 21.53 | 04.46 | 17.08 | 03.46 | 16.08 | 06.46 | 19.08 | 07.46 | 20.08 | 06.16 | 18.38 | 07.31 | 19.53 |
| 10. nov | 07.15 | 19.36 | 06.15 | 18.36 | 06.30 | 18.51 | 09.15 | 21.36 | 10.15 | 22.36 | 05.30 | 17.51 | 04.30 | 16.51 | 07.30 | 19.51 | 08.30 | 20.51 | 07.00 | 19.21 | 08.15 | 20.36 |